# Tikin norðan fyri Føroya Banka

Bót á 50.000 krónur var prísurin, skiparin á skotska trolaranum "Endeavour IV" mátti gjalda fyri at sleppa aftur til fiskiskap beinanvegin, eftir at hann varð tikin fyri ólógligan fiskiskap norðan fyri Føroya Banka. Verjuskipið Knud Rasmussen fór leygarmorgunin umborð á skotska trolaran at kanna veiði og reiðskap. Tá varnaðist eftirlitið, at vektin, sum trolarin hevði uppgivið at hava fiskað, var í kruvdari og sløgdari vekt, hóast hon eftir lógini skal uppgevast í rundari vekt. Tað endaði við, at skiparin fekk eitt sektaruppskot upp á 50.000 krónur frá Føroya Landfúta. Tá ið hann hevði góðtikið sektina og veitt trygd fyri pengunum, slapp hann aftur til fiskiskap.

*(mynd: Færøernes Kommando)*





*Sjógvurin er tað vandamesta arbeiðsplássið (Mynd: Vinnan)*

# Sjógvurin er tað vandamesta arbeiðsplássið

TRYGD
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

At tað kann vera hættisligt at arbeiða á og við sjógvin, vita føroyingar av royndum, men nú er tað eisini skjalprógvað, at sjógvurin er tað vandamesta arbeiðsplássið, sum ein kann velja sær.

Tað er tann heilt greiða niðurstøðan í einari kanning, sum tað danska fakfelagið 3F hevur latið gera í samstarvi við fyritøkuna Kaas & Mulvad. Kanningin er tann fyrsta av sínum slagi í Danmark.

Kanningin hjá 3F vísir, at vandin fyri, at ein danskur fiskimaður doyr av vanlukku, er hálva triðju ferðir størri enn hjá einum, sum arbeiðir uppi á landi. Tá talan er um danir, sum sigla við øðrum skipum enn fiskiskipum, er vandin á leið hálva aðru ferð størri.

- Vit hava hildið eygað við gongdini í mong ár. Arbeiðið á sjónum er sera strævið, bæði likamliga og sálarliga. Reiðaríini skerja manningartalið, men arbeiðsbyrðan er framvegis tann sama, so hvør maður hevur fingið meiri at gera, sigur formaðurin í danska sjómannafelagnum, Søren Lundin Sørensen, við DR-kringvarpið.

Men kanningin hjá 3F avdúkar eisini, at tað er ikki bara í sambandi við deyðsvanlukkur, at fiskimenninir og sjómenninir eru ovastir á vandalistanum. Tá hugt verður eftir, hvørjir arbeiðsbólkar eru best umboðaðir millum teir danir, sum doyggja av lungnakrabba, eru fiskimenninir á øðrum plássi. Bara lossingarmenninir eru omanfyri.

### Royking og kemisk evni

Formaðurin í danska sjómannafelagnum heldur, at tað eru tvinnar orsøkir til, at serliga nógvir fiskimenn, sjómenn og lossingarmenn doyggja av lungnakrabba.

- Tað er væl kent, at royking er lutfalsliga vanlig ímillum júst fiskimenn, sjómenn og lossingarmenn, men tíbetur gongur tað tann rætta vegin í tí høpi. Hin orsøkin er, at nógvir menn framvegis hava mein av teimum evnum, sum fyrr blivu brúkt til at mála og vaska skip, sig Søren Lundin Sørensen við danska kringvarpið.

Kanningin hjá 3F vísir, at aðrir arbeiðsbólkar, sum eru í størri vanda fyri arbeiðsvanlukkum enn fólk flest, eru teir, sum menn í flutnings- og pørtum av byggivinnuni.

# Ísland endurskoðar sína fiskiveiðiskipan



*Íslendska fiskivinnan skal vera sjálvberandi, sigur stjórnin*
*(Mynd: Morgunblaðið)*

**Í samsvari við samgonguskjalið hevur íslendska stjórnin sett eina væl mannaða nevnd at endurskoða fiskiveiðiskipanina**

FISKIVEIÐISKIPAN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Íslendska fiskiveiðiskipanin skal endurskoðast. Tað var eitt av málunum, sum Samfylkingin og Vinstrafylkingin lovaðu undir valstríðnum upp undir altingsvalið fyrr í ár, og nú er nevnd sett at gera arbeiðið.

Í síðstu viku setti Jón Bjarnason, fiskivinnu- og landbúnaðarráðharri, eina nevnd at endurskoða fiskiveiðiskipanina. Í arbeiðssetninginum hjá nevndini sæst, at hon skal lýsa verandi lóggávu, og hvussu hon virkar. Síðani skal nevndin koma við uppskotum um, hvat møguliga skal broytast, fyri at vinnan kann fáa varandi reglur at virka eftir, at fiskivinnan verður sjálvberandi, og at skipa fiskivinnuna eftir einum lógarkarmi, sum flestu íslendingar kunnu taka undir við.

Arbeiðsbólkurin hevur heimild til at leita sær upplýsingar og ráð, og hann skal lata fiskimálaráðharranum álitið fyri tann 1. november.

Stjórnin hevur ikki beinleiðis sagt, hvat hon fer at gera við verandi veiðiskipan, men í tíðindaskrivi í síðstu viku skrivaði fiskimálaráðharrin, at ráðharrin fer at laga komandi politikkin í samsvari við tilráðingina frá arbeiðsbólkinum.

### Vinnan væl umboðað

Arbeiðsbólkurin, sum skal endurskoða fiskiveiðiskipanina, hevur ikki færri enn 15 limir. Av teimum eru seks politikarar, og formaður er altingsmaðurin Guðbjartur Hannesson úr Samfylkingini. Hann og tríggir aðrir tinglimir umboða samgonguna, og andstøðuflokkarnir Sjálfstæðusflokkurin og Framsóknarflokkurin hevur hvør sín lim í arbeiðsbólkinum.

Hinir níggju limirnir eru úr ymsum feløgum innan fiskivinnuna. Teirra millum eru Árni Bjarnason,sum er formaður í fiski- og sjómannafelagnum, formaður Farmanna- og fiskimannasambands Íslands, Adolf Guðmundsson, formaður í reiðarafrelagnum og Arthúr Bogason, sum er formaður í felagnum hjá útróðrarmonnunum. Herumframt hava fiskavirkini og kommununarnar og umboð í arbeiðsbólkinum.